# Flugurnar fyribils burtur

**– Vit eru flutt inn aftur í húsini, men enn finna vit flugur, ið liggja hálvdeyðar ymsa staðni, sigur Kjartan Høgnesen**

FLUGUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Norðoyri:** Kjartan Høgnesen og familja hansara kundu síðst í januar mánaða flyta inn aftur í heim teirra, eftir at flugur í hópatali gjørdu innrás í húsinum nýggjárskvøld.

– Jú, vit fluttu innaftur síðst í januar mánaði, tí okkum longdist sjálvandi aftur í húsini. Men vit finna enn flugur ymsa staðni í húsinum, hóast tað hevur verið rættuliga kalt í veðrinum í seinastuni. Hetta eru ikki flugur í nøkrum serligum nøgdum, men onkur hevur verið frammi av og á. Men tað er ikki nógv um tær nú; tær flugurnar, ið vit hava sæð, hava verið meir deyðar enn livandi, fortelur Kjartan Høgnesen, nú vit taka samanum óhugnaliga tilburðin á nýggjárinum.



*Kjartan Høgnesen og familjan funnu yvir 1000 flugur í heimi teirra*

*Mynd: Norðlýsið*

### Yvir 1000 flugur gjørdu innrás

Hetta fór alt fram á sjálvari nýggjársaftan í ár. Kjartan og konan sótu við einum kaffimunni, tá Kjartan reisti seg fyri at lata vindeygað upp, so tey kundu hoyra skotini frá øllum rakettunum um midnáttarleitið.

Ì tí hann opnar vindeygað, sveima flugur í hópatali inn í húsini og skjóta seg niður eftir húsfólkunum.

– Har var ikki nógv at gera, vit máttu bara skunda okkum út úr húsinum. Tá eg komi útum, síggi eg, at allur endaveggurin á húsinum livdi. Hann var púra vekk aftan fyri allar flugurnar.

Kjartan og familjan gjørdu ikki mætari enn at flýggja til familju í Klaksvík, har tey so hava búleikast í eina tíð.

– Vit fóru útaftur til húsini tann næsta dagin fyri at vita, hvussu stóð til. Har vóru flugur allastaðni, so vit sproytaðu eina rúgvu av insekt-spray runt í øllum húsunum. Hetta sprayið var so sterkt, at tá eg sproytaði inn í millum vindeyguni uttanfyri, so doyðu flugurnar innanfyri eisini.

Eftir nakrar dagar fóru vit út aftur fyri at vaska og rudda upp eftir allan ruðuleikan, og funnu vit yvir 1000 flugur liggjandi deyðar í øllum húsunum.

### Helst tarafluga

Húsini hjá Kjartani og familjuni liggja heilt niðri við fjøruna á Norðoyri, og á fjøruni liggur sum oftast nógvur tari.

Beint við húsini stendur eitt fjós, og millum hetta fjós og húsið rann ein opin kloak.

– Vit hildu, at flugurnar møguliga komu frá kloakkini, men dagin eftir tilburðin komu fólk frá Klaksvíkar Býráð eisini á staðið at hyggja at umstøðunum. Tey tóku ein sokallaðan »prøva« av flugunum, og sendu hana suður til Dorethu Block á Náttúrugripasavninum í Havn. Hon sendi fluguna víðari til Danmarkar, og har hava tey staðfest, at talan var um eina taraflugu.

Men vit hava ein illgruna um, at talan heldur hevur verið um fleiri sløg av flugum hetta kvøldið. Har vóru jú so nógvar, og teir vóru heilt ymiskar á stødd. Summar vóru stórar sum skinnflugur, meðan aðrar vóru heilt smáar, greiðir Kjartan frá.

### Býráðið lagt nýtt rør

Eftir tilburðin varð nógv tosað um hesa opnu kloakkina, ið rann við húsini hjá Kjartani, og var onkur ábreiðsla eisini givin Klaksvíkar Býráð fyri hetta.

Hetta hevur býráðið eisini tikið til sín, tí eftir tilburðin hava teir lagt eitt rør við sjálvt kloakkrørið, sum nú leiðir kloakkvatnið víðari út á sjógv.

Allur tarin, sum lá í fjøruni, er eisini horvin, so Kjartan vónar, at hann og familjan fáa frið fyri flugum nú.

### Vónar tað besta

– Nú hava vit verið aftur í húsunum í eina tíð, og enn hava vit ikki upplivað nakra ørkymlandi nøgd av flugum. Men tað hevur eisini verið so kalt í veðrinum, at tað hevur ikki verið livandi hjá nøkrum smákyktum. Men vit vita jú ikki, um hon møguliga hevur lagt seg millum skins og hold, og so kemur framaftur, tá lýggjari verður í veðrinum. Men vit vildu sleppa inn aftur í heim okkara, so vit vóna tað besta, sigur Kjartan Høgnesen at enda.

## Mentanarnevndin umrøtt viðurskiftini hjá teimum

**Klaksvík:** Mentanarnevndin í Klaksvíkar Býráð hevði fund í gjár. Á fundinum kom millum annað fram, at nevndin hevur samtykt at biðja býráðið geva heimild til at lýsa eftir og seta ein leiðara til ætlaða ungdómshúsið. Sosiala nevnd skal orða ein ungdómspolitikk og umsitingin skal skjótast gjørligt finna hóskandi høli til ungdómshúsið.

Eyðgunn Samuelsen, virkandi forkvinna í Mentanarnevndini, sigur, at tað fer at taka sína tíð, at fáa hesi viðurskifti upp á pláss. Eitt er at finna høli, men tað skal eisini riggast til, so tað hóskar til endamálið.

– Vit høvdu viljað at tað kundi verið klárt til býráðsfundin, sum verður tann 26. februar, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

**- sae -**

# Broytingar á Selheyggi

VEGAARBEIÐI
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Klaksvíkar Kommuna arbeiðir við at leggja nýggj rør í tann eldra partin av býnum. Nú er arbeiðið, sum byrjaði fyri einum ári síðani á parkeringsøkinum niðanfyri kirkjuna, komið niðan á Selheygg. Í fjør summar arbeiddu teir frá Kommunubrekkuni og niðan til Selheygg, síðani varð farið omanum kirkjuna.

Kommunan leggur nýggja kloakk og avlastning, harundir er eitt rør til reint vatn og eitt til skitið vatn. Tað verður óneyðugt hjá húsarhaldunum í hesum økjunum at hava rottanga, tí at alt skal fara oman í reinsiverkið á Sandinum. Teir leggja eisini nýggja vatnleiðing. Harumframt leggja teir eisini fipurkaðalin hjá Føroya Tele. Nýggj gøtuljós skulu eisini gerast. Hetta arbeiðið er sera truplult, og tekur langa tíð, so tað er ongin tíðarætlan løgd.



*Arbeiðsmenninir í Klaksvíkar Kommunu hava úr at gera*

Harafturat hava teir flutt garðar fyri at breiðka vegin og gera eitt parkeringsøki á Selheyggi. Selheyggur er annars kendur fyri at vera sera vandamikil, tí hann er so høgur, so hugsanin hjá kommununi er at fara undir at lækka hann, tá ið líður móti sumri.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 15. februar til hósdagin 21. februar**

## Botnurin




*– Nýggj føroysk undirhaldsrøð*

*Á havsins botni dag og nátt har er so lítil friður og nú er heilt galið!!! Og tað er tí, at teir báðir »speed-snakkararnir« Tróndur Vatnhamar og Jens Tummas Næs, eru endaðir á botni í einum kavbáti.*

## Soleiðis

*Lydia Didriksen ummælir:*



Einaferð var tað ein sending, sum kallaðist *svf um svf.* Hvat er vorðið av hesi sending? Hesa seinastu tíðina hava fleiri sendingar verið í sjónvarpinum, sum hava verið ov illa lýstar. Fólk hava ikki varnast sendingarnar fyrr enn ov seint, t.v.s. tá ið onnur hava tosað um hesar sendingar. Ein ensk dokumentarsending, sum var send seint næstseinasta mánakvøld, var eitt tílíkt dømi. Onnur sending var Globus um suðurafrikanskar fangar. Eisini hetta var ein sending, sum fólk tosaðu um aftaná!

Sendingin um komandi sjónvarpssendingar gav fólki møguleika hvørt fríggjakvøld at kunna seg um, hvat var í sjónvarpinum komandi viku. Eitt einkisigandi heiti er ikki nóg mikið! Hví ikki gera eina undiryvirskriftir til dokumentarsendingar, tá ið heitið ikki sigur, hvat sendingin snýr seg um? Sama kundi verið gjørt til sendingar sum Globus og Breddan og hvat tær allar nú eita!

Mikukvøld plagar sendingin *Gesturin* at vera á skránni. Ofta haldi eg, at henda sendingin er ov stirvin og keðilig at hyggja eftir, men so var ikki, tá ið gesturin æt Johan Mortensen. Hesin litríki persónurin megnaði at skapa eina áhugaverda sending saman við vertinum. Tað var stuttligt og áhugavert at lurta eftir hansara hugsjónum og ætlanum. Hann sá nógvar møguleikar og virðir í føroyska tilfanginum, eisini føroysku listini. Og í hesum sambandinum nevndi hann tónleikin og helst tann mest umtalaða føroyingin í hesum døgum, nevniliga Pætur við Keldu.

Nógv hevur verið gjørt burtur úr Pæturi við Keldu í fjølmiðlunum. Sendingar og innsløg hava verið bæði í útvarpi og sjónvarpi um henda fryntliga og lítillætna tónleikaran. Øll vóru spent, hvussu danir fóru at taka ímóti honum, og tá ið avhasaði, vóru øll samd um, at hann var ein góður og virðiligur ambassadørur fyri Føroyar.

Minni var gjørt burtur úr Tóroddi Poulsen, tó ikki heilt einki. Leygardagin seinnapartin sendi útvarpið norðurlendskan upplestur úr Norðurlandahúsinum í nærum tveir tímar. Tað var hugaligt at lurta eftir og gleðiligt, at útvarpið valdi at brúka senditíðina til hetta tiltakið.

Sanniliga, um ikki eisini nógv var gjørt burtur úr teimum trimum ungu, sum vóru heiðrað við gávugóðsi úr Grunni Thorvald Poulsens av Steinum. Bæði útvarp og sjónvarp loftaðu handanini og høvdu innsløg við práti og samrøðum við tey gávaðu. Jú, tað eiga loftmiðlarnir báðir rós fyri hesuferð, tí tað er verri enn so altíð, at teir eru so fjølmentir til listarlig tiltøk!

So, hesa vikuna fari eg at siga: Soleiðis! Hatta var nakað av tí!!!

## Familjumøti í Meinigheitshúsinum




## Lat nú føstuklokku ringja




*Norska skaldakvinnan Dorothea Engelbrektsdatter, sum livdi frá 1634 til 1716. Hon yrkti kvøldsálmin »Dagen viger og går bort«*

## Vinterferiebio: Dumbo




## Skadestuen

